HOFF STOFF

# Kongaligu gestirnir í Vági

**Klokkan umleið 13 sást Dannebrog á Vágsfirði og júst eftir skránni legði skipið at bryggju innan klokkan 13.30**

KONGALIG VITJAN
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*



*Borgarstjórin í Vági, Kirstin Strøm Bech beyð vælkomin, tá kongaliga húskið var komið í land*

Kappróðrabátar og tiltiknu grindabátarnir í Vági tóku ímóti Dannebrog á Vágsfirði, tá kongaligu gestirnir komu til Vágs klokkan 13 seinnapartin týsdagin. Meðan eitt næmingaorkestur leikti horntónar, legði kongaskipið at bryggju og júst eftir skránni, klokkan 13:30, komu kongaligu gestirnir í land eftir reyða leyparanum.

Har tóku borgmeistarin, Kirstin Strøm Bech, og býráðslimir ímóti Drotning Margrethu, Hendrikki Prinsi, Krónprins Frederikki og Mary krúnprinsessu.

Tá tey høvdu heilsast fóru tey at heilsa øllum teim mongu fólknum, sum høvdu leitað sær á bryggjuna at heilsa kongaligu gestunum og síðani gekk leiðin á Hotel Bakkan til ábit.



*Tiltiknu grindabátarnir í Vági tóku saman við kappróðrarbátunum móti Dannebrog, tá tað stevndi inn á Vág týsdagin*



# Vitjaðu Johonnu TG 326

*Drotningini tóktist dáma gomlu sluppina væl, soleiðis sum hon nú er riggað til*

**Innan kongaligu gestirnir og fylgið teirra fóru úr Vági klokkan 16, vitjaðu tey umborð á sluppini Johonnu**

KONGALIG VITJAN
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Innan kongaligu gestirnir fóru úr Vági, varð vitjað oman aftur á bryggjuna, har Johanna TG 326 lá flaggskrýdd. Hetta flótandi sjósavn, sum eisini júst er komið aftur av søguligari ferð í Íslandi og Aberdeen, er ein stoltleiki hjá Vágsbygd at vísa fram og tóktust kongaligu gestirnir eisini hugtiknir av skipinum og av frágreiðingini, sum ein høvuðsmonnunum aftan fyri varðveitingina av sluppini, Gudmund Jacobsen, gav teimum um sluppina og søgu hennara.

Eisini tosaðu gestirnir við fleiri av teimum, sum ofta hava mannað Johonnu, t.d. nakrar teirra, sum vóru við á søguligu ferðini fyri stuttum.

Tá fylgið kom í land av Johonnu, gekk leiðin úr Vági og norður eftir oynni til Tvøroyrar.